# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um mína góðu mammu og pápa

# Hertu og Ingjald



Nú eru tit farin heim til Harran. Eg minnist tá ið tú plagdi at hoyggja hjá Jákup Petersen, har tú fekst besta lambi í løn, tá var eg bert 6 ár. So plagdu vit at breiða fisk á fiskastykkinum hjá Sámal Peturi Petersen í Fuglafirði. So plagdu vit at skera torv norðuri í Halgadali saman við Jakku.

Mamma hevði eitt tungt hús við 8 børnum. Vit báðir, Franklin og eg, plagdu at leita eftir rekaviði í fjøruni til at brenna. Pápi, tú plagdi at passa motorarnar á trøðni saman við Ditlev Eledevig áðrenn SEV kom. Pápi sigldi í nógv ár við Vón og Fame, sum Sigurd Simonsen í Fuglafirði átti.

Mamma og pápi, tit verða ongantíð gloymd. Friður veri yvir minni tykkara.

**Tórshallur Andreasen**

## Andlát og jarðarferðir

**Renhard Thomsen, Sandvík**, andaðist týsdagin 77 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13 úr Sandvíkar kirkju. Tey, ið vilja minnast Renhard kunnu lata Sandvíkar kirkju eina peningagávu.

**Elsa Johansen**, ættað úr Haldarsvík, búsitandi á Lag í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 95 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju leygardagin kl. 13.

## Tøkk

Ogur takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið pápi okkara

**Bent Danielsen**
Tvøroyri

andaðist og fór til gravar.

**John, Martin og Andreas**

# Jeppesen í Smiðjuni

Fríggjadagin 18. apríl lata listakvinnurnar Kirsten Mørup Jeppesen og dótturin, Ea Jeppesen, upp framsýningina »tað ið verður borið« í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Tær eru báðar búsitandi í Danmark.

Heitið á framsýningini »tað ið verður borið« merkir, at á framsýningini eru myndevnini tað sum verður borið sum t.d. taskur og kjólar og nógv ymiskt annað. Dótturin, Ea Jeppesen, hevur eisini yrkingar við á framsýningini.

Kirsten er hálvføroysk, mamman er føroysk, Alma, dóttir Hans Nielsen, úr Kvívík. Hetta er sættu ferð, at Kirsten sýnir fram í Smiðjuni.

Seinastu nógvu árini hevur Kirsten málað, fyrst vóru tað mest alvarellir, men seinnu árini hevur hon málað nógvar oljumálningar, umframt at hon ger ymiskt annað.

Framsýningin verður opin til og við týsdagin 22. apríl, allar dagar frá kl. 14.00 – 20.00.

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Kirsten Mørup Jeppesen við framsýningini »tað ið verður borið*



*Ea Jeppesen hevur eisini yrkingar við á framsýningini*

## Tøkk

Hjartans tøkk øll tit sum vístu samkenslu og hjálpsemi tá okkara kæra

**Sigga Maria Joensen**
Leirvík

doyði og varð jarðað.
Tøkk til Meinhard Bjartalíð, Regin Høgnesen og Una Næs fyri góð og troystarík orð.
Tøkk til sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk øll tit sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk til tykkum á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, sum hava verið so væl um hana tey seinastu mongu árini.

**Familjan**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum gjørdu mær føðingardagin 14. desember hugnaligan og hátíðarligan takki eg hjartaliga. Takk fyri vitjanir, heilsanir og gávur.

**Marianna Lisberg Madsen**
**Sandur**